# Til samráðingar við væl mannaðum liði

*Tað verður eitt væl fyrireikað og væl mannað lið, landsstýrið hósdagin sendir til Danmarkar at seta hol á samráðingarnar um føroyskt fullveldi*

JOHN JOHANNESSEN

Hópurin verður stórur, ið hósdagin fer úr Føroyum til Keypmannahavnar at seta hol á fullveldissamráðingarnar við donsku stjórnina.

Løgmaður verður á odda við varaløgmanni, landsstýrismonnunum, Helenu Dam á Neystabø og Karsteni Hansen í fylgi. Við verður eisini ein riðil av føroyskum embætisfólkum, ið skulu ráðgeva landsstýrinum meðan samáðst verður.

Á middegi í gjár var ikki endaliga avgjørt, hvør skuldi vera við í stóra samráðingarliðnum. Men tó var heilt vist, at landsstýrismenninir í ávikavist almanna- og heilsumálum og fíggjarmálum fóru við. Men møguleikin fyri, at onnur landsstýrisfólk eisini verða við, er opin.

Høgni Hoydal, varaløgmaður og landsstýrismaður í sjálvstýrismálum, leggur dent á, at tað er av alstórum týdningi at fáa so holla ráðgeving, sum møguligt undir øllum samráðingunum. Tí verður talið av embætisfólkum, ið verða við til samráðingarnar, stórt.

– Talan er um eitt álvarsmál við nógvum ymiskum smálutum, ið greiða skal fáast á. Tí er neyðugt at hava embætisfólk við hondina, ið kenna til hesar smálutir og tískil kunnu ráðgeva okkum, sigur Høgni Hoydal.

Roknað verður við, at fyrsti samráðingafundurin kemur at verða ein tann mest týðandi fundurin í samráðingunum um ríkisrættarligu støðuna. Á hesum fundi skal leistur finnast fyri mannagongdini í samráðingunum, og møguleiki er eisini fyri, at partarnir koma víðari í hesum umfari.

Høgni Hoydal, varaløgmaður, sigur, at danir hava allar fortreytir fyri at vera væl fyrireikaðir til samráðingarnar. Uppritið og annað tilfar er umsett til danskt og sent stjórnini og fólkatingslimum, so teir eru eins væl kunnaðir um málið, sum føroyingar.

– Vit rokna við einum arbeiðsdegi til at leggja leistin fyri víðari samráðingum. Men, um annað hendir, ber ikki til at siga, sigur Høgni Hoydal.

Ríkisrættarligu samráðingarnar millum donsku stjórnina og landsstýrið byrja fríggjadagin 17. mars klokkan 16:00 í danska forsætismálaráðnum.



*Christiansborg verður karmur um fyrsta umfar av samráðingunum millum donsku stjórnina og Føroya Landsstýri um føroyskt fullveldi*

## Olga verður samskipari

*Samskiparin, sum skal leggja arbeiðið við útjaðaraverkætlanini til rættis, er nú funnin*

EYÐUN KLAKSTEIN

Tað verður Olga Biskopstø í Klaksvík, sum skal samskipa útjaðaraverkætlanina hjá landsstýrinum.

Hetta boðaði løgmansskrivstovan frá fríggjadagin.

Verkætlanin kom í lag eftir ein fund um støðuna hjá útjaðaranum, sum varð hildin í Fugloy í fjør. Anfinn Kallsberg, løgmaður, avgjørdi tá, at ein bólkur skuldi arbeiða við málinum at menna útjaðaran.

Ein nevnd, sum verður mannað við umboðum fyri útoyggjarnar og Løgmansskrivstovuna, skal orða ein útoyggjapolitikk. Nevndin skal gera ítøkilig menningarhugskot, sum skulu tryggja virksemi og trivna á útoyggjunum.

Ein samskipari skal standa fyri arbeiðnum, og tað verður Olga Biskopstø, sum er útbúgvin cand. com. – tað er ein universitetsútbúgving í samfelagsfrøði og samskifti.

Hon skal orða ein arbeiðssetning til nevndina at arbeiða eftir.

**Bara mannfólk**

Enn eru limirnir í nevndini ikki valdir. Løgmaður segði í gjár við Dagblaðið, at allar kommunurnar høvdu innstillað mannfólk, og tað vildi javnstøðunevndin ikki góðtaka. Tí hava kommunurnar nú fingið boð um at innstilla eitt mannfólk og eitt konufólk. Tá hetta er gjørt, kann nevndin setast.

Ætlanin er eisini at seta ein verkætlanarbólk undir Undirvísingar- og Mentamálastýrinum, sum skal arbeiða við økismenning á teimum størru plássunum kring landið.

Fyri at tryggja samanhang millum hesar verkætlanir verður skipað samband millum nevndirnar.

## Klekkja steinbít í Nesvík

*Hjá Fiskaaling í Nesvík hava tey í løtuni gott hálvtannaðhundrað steinbítayngul gangandi. Steinbítarnir eru klaktir úr rognum, sum Norðheim hevur fingið í skeljatrolinum*

EDVARD JOENSEN

Enn eru teir bara sum vanlig kombikk til støddar. Teir umleið 160 steinbítarnir, sum ganga í einum kari í Nesvík. Men vónandi fara teir at vaksa og verða til ein burðardyggan stovn, siga tey á Fiskaaling.

Tað var heilt av tilvild, greiðir Poul Vestargaard á Fiskaaling frá, at tey fingu hesar steinbítarnar til Nesvíkar.

Tað var ein dagin herfyri, at skeljatrolarin Norðheim av Oyri fekk ein gulligan klump, sum eitt hampiligt knetti, í trolið.

Umborð á Norðheim vistu teir væl, at hetta vóru steinbítarogn, tí teir hava fyrr fingið tey í, meðan teir hava trolað eftir skeljum eystanfyri.

Fyri nøkrum árum síðan lótu teir Fiskaaling eitt slíkt knetti, sum varð klakt. Men eitt óhapp førdi tá til, at steinbítarnir doyðu.

Nú royndu teir so aftur, sigur Poul Vestergard. Teir lótu rognini í eina spann, har tey so vóru einar tveir dagar, til tað byrjaði at kleka. Síðan vórðu tey heintað av fólki frá Fiskaaling, sum fingu rogn og klaktan yngul til Nesvíkar.

Á klekistøðini í Nesvík ganga nú hesir smáu steinbítarnir í einum kari. Á Fiskaaling ætla tey at royna at fáa teir at vaksa og møguliga fáa ein stovn burturúr.

Men tað er ikki nakað, sum tilætlað er, sigur Poul Vestergaard. Hetta er ein síðuvinningur, sum heilt av tilvild er dottin inn á gólvið, so at siga. So nú er bara at royna at fáa tað besta burturúr, sigur hann.



*Steinbítarnir í Nesvík eru enn ikki størri enn kombikk...*

**Mynd: Edvard Jonesen**

## Høgni Hoydal skrivað bók um fullveldi

*Um ein mánað ella so kemur bók um føroyska sjálvstýrisrørðslu eftir Høgna Hoydal, landstýrismann, út á donskum forlag*

JOHN JOHANNESSEN

Landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum, Høgni Hoydal, er liðugur við bók um føroysku fullveldistilgongdina frá gomlum døgum og fram til í dag.

Handritið er latið danska forlagnum Lindhardt og Ringhoff, og um ein mánað ella har um leið kemur fyrsta bókin eftir Høgna Hoydal út á prenti. Hon verður á donskum máli.

Høgni Hoydal greiðir frá, at talan ikki er um eina bók, hann av sær sjálvum hevur sett seg niður at skriva.

– Danska forlagið, ið gevur út ymsikar kjakbøkur, heitti fyri tíð síðani á meg um at skriva hesa bók, og tók eg av. Forlagið hevur fyrr givið út kjakbók um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark, sigur Høgni Hoydal.

Landsstýrismaðurin greiðir frá, at bókin telur 100 síður og er ein politisk bók, ið greiðir frá hansara hugsanum um føroyska sjálvstýrisrørðslu. Tí hevur tað ikki verið serliga møtumikið at skriva bókina.

Høgni Hoydal veit ikki, um fleiri bøkur fara at koma frá hansara hond. Men hann sigur tó, at tá hann nú hevur skrivað bók á donskum, fer hann at umhugsa eisini at skriva bók á føroyskum.

– Hendan bókin, eg havi skrivað, er sum sagt politisk. Tí kann eg ikki siga, um eg eri egnaður at skriva fagrar bøkur ella søguligar bøkur, tá eg enn ikki havi roynt tað, sigur Høgni Hoydal, ið heldur tað vera heldur tíðliga at fara at skriva endurminningar.





# Tórshavnar býráð latið stuðul til ríðihøll

*Føroyskt íslandsrossafelag hevur fingið játtað knappa millión í stuðuli frá Tórshavnar býráð til at byggja ríðihøll í Havnadali*

JOHN JOHANNESSEN

Tórshavnar býráð hevur gjørt av at stuðla Føroyskum íslensktrossafelagi við knappari millión til at byggja eina ríðihøll og felagshøli fyri í Havnadali.

Sjálv ríðihøllin skal vera 1.150 fermetrar til víddar. Síðani skal høllin eisini umfata eitt felagshøli á 160 fermetrar, somuleiðis sum 160 fermetrar verða tøkir oman á felagshølunum.

Rossafelagið sigur í umsókn síni til býráðið, at tað er avgjørt neyðugt við einari ríðihøll í Havnadali, tá hugsa verður um føroyska veðurlagið. Felagið vísir á, at tað javnan skipar fyri ríðing fyri brekað, og krevur hetta, at ein høll er til taks.

Í umsókníni verður eisini víst á, at oman á felagshølunum verða 160 fermetrar til taks, ið býráðið kann nýta til barnaansing. Hendan spurningin hevur Tórshavnar býráð ikki tikið støðu til, men tað hevur gjørt av at játta rossafelagnum peningin yvir trý ár.

Rossafelagið roknar við, at ríðihøllin og felagshølini koma at kosta 2.798.000 krónur. Tað hevur søkt býráðið um stuðul til ein triðing av prísinum og landsstýrið um ein triðing. Seinasta triðingin fíggjar felagið sjálvt.

Landsstýrið hevur enn ikki svarað, um tað fer at stuðla rossafelagnum.



## Á grækarismessu

Veri tú vælkomið tjaldrið
higar aftur aftur.
Nú er eingin hagi í Havnardali,
eingin friðstaður at reiðrast.
Nú ert tú urtagarðsfuglur og
køksfuglur,
fær tær ein mola
saman við spurrum og øðrum
húsavinum.
Frælsi og sjálvbjargni?

“Tjaldrið vera skal várt merki
hvar vit halda fram”.

*yrkt grækarismessuaftan 2000*
Regin Dahl

## Jens farin til arbeiðis

JÓGVAN HUGO GARDAR, OSLO

Jens Stoltenberg hevur síðani hóskvøldið arbeitt við at fyrireika sína fyrstu stjórn.

Hann fekk møguleikan at taka við sum forsætisráðharri í Noregi, tá Kjell Magne Bondevik ikki vildi góðtaka tað, sum meirlutin kravdi - at Noreg skal loyva bygging av gassorkuverkum sum ikki eru CO2-frí.

Jens Stoltenberg hevur bert havt fáar vikur sum leiðari fyri tingbólkinum hjá Arbeiderpartiet. Thorbjørn Jagland lat upp í hendurnar hjá Jens at gerast formaður í tingbólkinum og samstundis fekk hann sum uppgávu at vera floksins boð uppá forsætisráðharra. Hetta hendi í februar, og nú skal Jens Stoltenberg um fáar dagar til Kong Harald, har hann skal vísa fram sína stjórn.

Púrt einki er komið út um, hvønn Stoltenberg vil hava við í stjórn sína. Men gitingarnar eru nógvar. Ein giting, sum neyvan er heilt av leið, er at floksformaðurin Thorbjørn Jagland gerst nýggjur uttanríkisráðharri. Hann er í dag formaður í uttanríkisnevndini í Stórtinginum og hevur eisini nevnt sjálvur, at uttanríkismálaráðið er í hansara huga.

Jens Stoltenberg hevur lovað at í minsta lagi 40 prosent av ráðharrunum skulu vera kvinnur. Einstøk bløð hava gitt, at Stoltenberg kanska eisini vil velja at hava ein meirluta av kvinnum í stjórnini. Ger hann tað, so er tað fyrstu ferð í søguni ,at slíkt hendir.

Stoltenberg hevur ikki sagt, nær stjórnin skal vera klár, men vónar, at hetta kann gerast í vikuni. Annars hevur hann ikki nakra freist. Kjell Magne Bondevik og stjórn hansara situr, til Jens Stoltenberg er klárur.

Nýggja stjórnin verður ein minniluta stjórn, har bert Arbeiderpartiet situr. Norska Arbeiderpartiet hevur ikki sitið í stjórn saman við øðrum flokkum áður, og sjálvt um tey í dag ikki eru líka avvísandi til samstarv, so hendir hetta ikki í hesum umfarinum. Møguleikin er størri aftan á Stórtingsvalið í september í 2001.



*Komandi norski forsætismálaráðharrin verður tann 40 ára gamli Jens Stoltenberg*




Heimurin broytist hvønn einasta dag. Tí mást tú gera teg til reiðar at fylgja við.
Handilsskúlin hevur alla ta nýggjastu kunningartøknina og brynjar teg til framtíðina. Uttan mun til um tú eftir Handilsskúlan velur eina hægri útbúgving sum t.d. løgfrøði ella búskaparfrøði ella fert beinleiðis út í vinnulívið. Uttan mun til um tú velur FHS ella Hægri Handilsskúla. Handilsskúlin gevur tær **bæði** møguleika fyri fram-haldslestri **og** vinnuførleika.

Ring til okkara ella støkk inn á gólvið, um tú vilt vita meira um Handilsskúlan.
Seinasta freist at tekna seg til Handilsskúlan er 15. mars.

**Hví taka annað, tá tú kanst fáa bæði?**

FØROYA HANDILSSKÚLI
Marknagilsvegur 77, Postsmoga 177, 110 Tórshavn, Tel 31 71 77
Kambsdalur, 530 Fuglafjørður, Tel 44 49 00

www • team 85 • fo